# Ferðavinnu-kanningin framløgd

*Kanningin, sum Bornholms Forskningscenter hevur gjørt av føroysku ferðavinnuni, varð framløgd mikudagin*

EDVARD JOENSEN

Stóra ferðavinnukanningin, sum Bornholms Forskningscenter hevur gjørt í Føroyum, varð løgd fram á tíðindafundi beint eftir, at blaðið fór til prentingar mikudagin.

Heri Niclasen, stjóri á Ferðaráð Føroya, sigur í viðmerking til Sosialin, at kanningin vísir, at føroyska ferðavinnan er í spakuligari, men støðugari menning. Hann metir avgjørt frundarlag vera fyri teimum útbygginginum, vit í løtuni síggja innan ferðavinnuna. Eitt nú nýggja Norrønu og eitt flogfar aftrat til Atlantsflog.

Eisini eru onnur feløg, sum hava rutur hendanveg, til dømis Maersk Air, sum koma við nýggjum og víðkaðum ferðatilboðum til føroyingar.

Tað eru tey bæði Charlotte R. Rassing og Anders Sørensen frá Bornholms Forskningscenter, sum hava gjørt kanningina.

Kanningin vardi eitt ár. Frá 15. maj 1999 til 14. mai 2000. Kanningin vísti, at 38.500 fólk ferðaðust til Føroya hetta árið. Tað eru øll íroknað. Vanligir turista, vinnuferðandi, fólk, sum komu at vitja skyldfólk, og hvat nú kann vera.

Grundarlagið undir kanningini eru spurningar sum settir eru 1.556 turistum og 2.184 fastbúgvandi føroyingum.

Fremmandafólkini hava svarað uppá, hví tey valdu Føroyar sum ferðamál. Hvørji tey eru. Aldur, útbúgving, sosiala støðu og mangt annað. Hvussu tey hava ferðast hendanveg, hvar og hvussu tey búðu, hvørjum tey hugdu at í Føroyum og eina rúgvu aftrat.

Føroyingarnir í kanningini hava sagt frá, hvussu teirra ferðamynstur er. Um tey ferðast í Føroyum, fara uttanlands og so framvegis.

Heri Niclasen sigur annars, at Ferðaráð Føroya tann 27. oktober fer at kalla føroysku ferðavinnuna saman til ein sonevndan ferðavinnudag, har úrslitið av kanningin verður meira nágreiniliga viðgjørt.




## Sigla ikki við Brimli

Maskinmeistarafelagið hevur nú boðað frá, at tað noktar limum sínum at sigla við nýggja vaktar- og bjargingarskipinum BRIMLI so leingi, sum sáttmálaviðurskiftini ikki eru komin í rættlag.

Hetta forboð forðar tó ikki limum felagsins at gera arbeiði umborð, meðan skipið liggur við bryggju.

# Standa nógv sterkari tá ið vit skulu verja grindadráp

*–Umrøðan av grindadrápinum í Fólkatinginum er eitt óvæntað úrslit av vitjanini hjá Paul Watson í Føroyum, heldur Justines Olsen, djóralækni, sum hevur gjørt nógv fyri at bøta um grindadrápið*

ÁKI BERTHOLDSEN

Umrøðan, sum danska Fólkatingið herfyri gav grindadrápi hevur sera stóran týdning fyri føroyingar.

Tað heldur Justines Olsen, djóralækani.

Í nógv ár hevur hann verið undangongumaður í arbeiðnum at bøta um drápsháttin.

Og hann heldur, at tá ið vit skulu verja grindadrápið, styrkir tað munandi um støðu úteftir, at so mætir og viðurkendir menn sum Peter Sandøe halda, at tað er ongin orsøk til at finnast at grindadrápi útfrá einum siðsemiligum sjónarmiði.

Tað var í kjalarvørrinum á vitjanini hjá tiltikna umhvørvisverndarmanninum. Paul Watson í Føroyum í summar, at danski fólkatingslimurin, Aase D. Madsen úr Dansk Folkeparti, reisti málið á fólkatingið, sum vit hava greitt frá á síðu 5.

–Hetta var so ein óvæntaður eykavinningur, sum vit fingu burturúr vitjanini hjá Paul Watson. Og hetta var eitt av teimum fáu úrslitunum, sum vit kunnu takka honum fyri, heldur Justines Olsen.

At so Dansk Folkeparti tekur málið upp, er eitt úrslit av eini grein, sum Trygvi Johansen á føroysku viðskiftastovuni skrivaði í Jyllandsposten í juli í summar, har hann vardi rætt okkara at drepa grind.

### Stóran týdning

Hann vísir á, at m.a. Peter Sandøe er ein viðurkendur serfrøðingur á økinum.

– Og eg haldi, at tað hevur stóran týdning fyri okkum, at ein maður sum hann ikki heldur, at tað er nøkur orsøk til at finnast grindadrápið útfrá einum siðsemiligum sjónarmiði.

Hann vísir eisini á, at danska djóraverndarfelagið hevur nøkur fyrivarni fyri grindadrápið og kann ikki taka undir við tí av tí at ávís krøv ikki vera uppfylt.

– Eitt nú vilja teir ikki góðtaka hvalváknið og krókin, og at hvalur verður dripin frá báti.

– Men hvalváknið er bannað og tað er bara í heilt serligum førum, at hvalur verður dripin frá báti og at tað er loyvt at brúka krók.

–So at siga tað einasta, sum danska djóraverndarfelagipð hevur eftir at finnast at, er, at hvalurin verður strongdur, tá ið hann verður rikin í drápið.

–Men í veruleikanum er tað ongin, sum veit nakað sum helst um hetta, sigur Justines Olsen.

Hann sigur, at av tí, sum donsku serfrøðingarnir siga, framgongur, at tað er onki alternativ til drápsháttin, sum vit nú brúka.

–Teir vísa eisini aftur, at grindadráp kann samanberast við tað, sum fer fram á einum sáturvirki.

– Tað er annars vanligt at samanbera avlíving av hvali við avlíving av einum dýri á einum sláturhúsi.

– Men nú eru so hesir donsku serfrøðingarnir samdir við okkum um, at tað ber ikki til.

Tí heldur hann samanumtikið, at umrøðan í danska Fólkatinginum hevur styrkt okkara støðu úteftir.

–Men støðan hjá donsku serfrøðingunum til grindadráp hevur eisini gjørt tað nógv lættari at samskifta við útheimin um grindadráp - í hvussu so er við danir.

Og ikki minst tað heldur hann hevur stóran týdning, tí tað er mest í donskum bløðum, at grindadráp verður viðgjørt.



*Viðgerðin á Fólkatingi kemur sera væl við hjá føroyingum, sigur Justines Olsen, djóralækni*



# Danskur djóraserfrøðingur gevur grønt ljós fyri grindadrápi

*– Tað er ongin orsøk til at finnast at grindadrápi útfrá einum siðsemiligum sjónarmiði, sigur formaðurin í danska djórasiðsemiráðnum*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Tað er ongin orsøk til at finnast at grindadrápi, sigur hin kanska fremsti, danski serfrøðingurin í djórasiðsemi. Hann sigur, at verður rætt atborið, tykist drápshátturin at vera rættiliga effektivur*

– Grindadráp í Føroyum kann ikki samanberast við tað, sum fer fram á einum donskum sláturvirki.

– Men í Føroyum er nógv gjørt fyri at bøta um grindadrápi.

Tað eru danskir djóraserfrøðingar samdir um.

Spurningurin um grindadráp hevur aftur verið til umrøðu í Danmark.

Men hesuferð hevur umrøðan verið á hægsta stigi - í sjálvum Fólkatinginum.

Málið tók seg upp herfyri, tá ið fólkatingslimurin, Aase D. Madsen úr Dansk Folkeparti, vildi hava Frank Jensen, lógmálaráðharra, at svara nøkrum spurningum um grindadráp.

Fólkatingslimurin vildi hava at vita, um tað bar til hjá lógmálaráðharranum at vátta, at føroyingar hava bøtt um grindadrápið tey seinastu árini.

Hon vildi eisini hava at vita, um drápshátturin nú kundi samanberast við mátan, sum stór djór vórðu dripin uppá á donskum sláturvirkjum.

Og at enda spyr hon um eisini djóralæknar, granskarar og djórasiðseminevndin góðtaka grindadráp, soleiðis sum tað nú fer fram.

Í einum rættiliga drúgvum svari hevur lógmálaráðharrin biðið Føroya Landsstýrið um eina frágreiðing.

Men harumframt hevur hann eisini biðið danska Djóraverndarfelagið, danska Djóralæknafelagið og djórafrøðingin, Karl Kinze á danska Djórasavninum siga sína meining um grindadráp

At enda bað hann Christinu Lockyer frá fiskirannsóknarstovuni, siga sína meining um grindadráp. Men hvørki hon, ella Djóralæknafelagið hava svarað.

### Drápið nógv batnað

Allir teir tríggir serfrøðingarnir, sum hava svarað, eru á einum máli um, at grindadráp kann ikki samannerast við støðuna á einum donskum sláturvirki.

Teir halda, at grindadráp eigur heldur at samanberast við veiði.

Danska Djórasiðseminevndin hevur ikki viðgjørt grindadráp.

Men formaðurin í felagnum, Peter Sandøe, granskingarprofessari, vísir á, at tey seinastu árini er nógv gjørt fyri at bøta um grindadrápið. Bæði skulu hvalvágir góðkennast og tær verða hildnar viðlíka. Samtundis er hvalváknið bannað og ein nýggjur grindakrókur er mentur

Annars heldur hann, at grindadráp skal samanberast við veiði og tað kann ikki samanberast við tað, sum fer fram á einum sláturvirki.

– Slátridjór verða ald og kunnu flytast á sláturvirki og verða dripin undir skipaðum umstøðum.

– Hinvegin verða hvalirnir fangaðir livandi og síðani dripnir.

– Men tað merkir eisini, at trupulleikin við lamskotnum djórum ikki kann samanberast við vanliga veiði.

Hann vísir eisini á, at grindahvalur er ikki eitt hótt djóraslag.

Hann sigur eisini, at verður rætt atborið, tykist drápshátturin at vera rættiliga effektivur.

Í hesum sambandi vísir Frank Jensen, lógmálaráðharri, á, at nýggjar kanningar hava víst, at heilin á hvali fær blóð ígjøgnum æðrar, sum liggja tætt rundanum mønuna og ikki ígjøgnum pulsæðrar í hálsinum.

– Tí er mønustingurin als ikki ein so ómenniskjansligur drápsháttur, sum nógv hava hildið, tí samstundis verða blóðæðrarnar til heilan skornar av, og hvalurin missir tí vitið við tað sama og følir tí heldur ikki pínu.

Formaðurin í djórasiðseminevndini sigur, at í grundregluni kann grindadráp samanberast við at slakta eftir tí serliga jødiska og muslimska mátanum.

– Men tveir høvuðsmunur eru kortini mótvegis átrúnaðarligum slakti, tí har verður dýrið dripið í eini handavending við einum einasta skurði.

– Men tá ið hvalur skal skerast á háls, kann tað verða neyðugt at skera longri og at skera fleiri ferðir, áðrenn lívið fæst av honum.

Samanumtikið heldur hann, at enn meiri kann gerast fyri at bøta um grindadrápið, eitt nú við at læra fólk at skera á háls.

– Men tað kann eisini bøtast nógv um mátan, sum danir brúka djór uppá.

– Útfrá einum djórasiðsemiligari áskoðan, haldi eg, at gongdin í Føroyum er sera positiv, har grindamenn sjálvir royna at bøta um drápsháttin og at gera hann tíðarhóskandi.

– Eg haldi ikki, at tað er nakar serligur munur á grindadrápi og øðrum, góðtakiligum brúki av djórum.

– Og útfrá einum djórasiðsemiligum sjónarmiði, haldi eg ikki, at tað er nøkur orsøk til at finnast at grindadrápi, sigur Peter Sandøe.

Eisini djórafrøðingurin, Karl Kinze vísir á, at drápshátturin er nógv batnaður og at ávísur reiðskapur er bannaður, ella munandi avmarkaður.

Hann heldur ikki, at grindadráp er ein djórafrøðiligur spurningur, men at tað er ein spurningur um áskoðan.

Danska djóraverndarfelagið sigur, at í grundregluni eru tey ikki ímóti, at villini súgdjór verða gagnnýtt.

– Men tað skal gerast forsvarliga.

Og felagið heldur ikki, at grindadráp er forsvarligt, tí hvalurin verður strongdur, hvalvákn og krókur verða brúkt og at hvalur ikki skal drepast frá báti.

Men danski lógmálaráðharrin vísir júst á, at hvalváknið er bannað og at tað bara er í heilt serligum føri, at tað er loyvt at drepa hval frá báti.

Hann vísir eisini á, at altjóða hvalaveiðifelagsskapurin, IWC, viðurkendi í 1995 tær ábøtur, sum grindadrápið hevur verið fyri.

